


Dysturin verður leiktur á Old Trafford mánakvøldið, 20. september. Flogið verður beinleiðis við Atlantic Airways til Manchester, har steðgað verður í tveir dagar. Gist verður á 4-stjørnaðum hotelli, og eisini verður skipað fyri rundferð á Old Trafford.

Meira fæst annars at vita um túrin á www.mb.fo

FØROYAPRENT

Í mannamunni hevur Old Trafford í mong ár borið heitið, Theatre of Dreams. Og tað er eingin loyna, at tað eisini er dreymurin hjá mongum at síggja the Mighty Reds spæla á heimavølli.

Saman við MB-Tours hevur tú nú møguleikan til at fáa dreymin uppfyltan. Tann 20. september er nevnliga ein av ársins dystum í Premier League, tá Manchester United tekur ímóti Liverpool. MB-Tours skipar í hesum sambandi fyri ferð til dystin, og saman við Sosialinum lutar MB-Tours eisini eina ferð burtur til dystin.

Fyri at vera við í kappingini um dreymaferðina krevst bara, at tú tekur lut í kappingini, sum Sosialurin skipar fyri. Spurningarnir eru í Sosialinum, dagarnar 11.- 24. august 2004.

Hvørja ferð eru tríggir spurningar, sum hava eitthvørt við hesi bæði mætu ensku feløgini at gera. Alt, sum tú skalt gera, er at svara spurningunum, so hvørt hesir eru í blaðnum, og síðani senda teir tíggju svarleparnar inn til okkara. Brævbjálvar við seðlunum skulu merkjast "kapping", og skulu sendast til:

**Sosialurin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Saman við svarlepunum skulu vit hava upplýsingar um navn, bústað og tlf. nummarið hjá tær. Drigið verður um vinningin mánadagin 30. august, og mugu seðlar til kappingina tí vera okkum í hendi í seinasta lagi leygardagin, 28. august.

Klipp henda spurnarlepa út, og send til Sosialin

**10 - VANLUKKUR**
**Umframt glæsisligu sigrarnar, so hava bæði Manchester United og Liverpool havt sínar vanlukkur.**

1. Á hvørjum leikvølli var vanlukkan, sum kravdi 96 mannalív, tá Liverpool og Nottingham Forest leiktu hálvfinalu í ensku steypakappingini?

Svar:

2. Nærum eitt heilt lið av framúr evnaríkum leikarum lat lív, tá flogfarið við Manchester United liðnum skuldi fara á flog í München. Men hvat ár hendi hetta?

Svar:

3. Ein dystur millum Liverpool og Juventus var í 1985 beinleiðis atvoldin til, at ensk feløg fingu drúgt bann frá europeiskum fótbólti. Men á hvørjum leikvølli fór Europa-Cup finalan fram tað árið?

Svar:

Navn:

Bústaður:

Telefon:

ATLANTIC AIRWAYS
Sosialurin
MB-TOURS



**VIÐMERKINGAR**

# Ólógliga byggiloyvi í Klaksvík - viðmerking

**Abraham Mikladal**



**Hetta eru nakrar viðmerkingar til samrøðurnar Sosialurin hevði við Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóra í Klaksvík, Karl Hera Joensen, form. í teknisku nevnd og Hildebrand Andreassen byggiharra.**

Fyrst av øllum skal eg vegna grannanar til matr.nr. 1284 og økisbúgvarnar gera greitt og undirstrika at vit einki hava ímóti Hildibrand Andreasen, í eigur matr.nr. 1284. Tað veit Hildebrand Andrasen eisini tí eg, og fleiri við, hava greitt honum frá hesum. Hildebrand er ikki beinleiðis partur í málinum, hann hevur søkt um og fingið eitt byggiloyvi frá Klaksvíkar kommunu, sum nú er ógildað av Innlendismálaráðnum. Beinleiðis partar í málinum eru Klaksvíkar kommuna og grannar/økisbúgvar.

Tað er Klaksvíkar kommuna við Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóra, sum ovasta umsitingarleiðara og Karl Hera Joensen, sum form. í teknisku nevnd, sum hava ført eigaran út í óføri við at hava brotið byggisamtyktina í tveimum, ella rættari, í trimum førum:

1. Við ikki at lata byggimálið út til hoyringar hjá grannunum, sum ásett í §9 stk. 3
2. og at hava loyvt so stórum fráviki í byggiloyvinum, at fari er langt útum tvær ásetingar í byggisamtyktini.

**Karl Heri Joensen, form. í TN,** sigur í viðtaluni at talan var um 46 fermetrar, sum gjørdi at Innlendismálaráðið ógildaði byggiloyvi. Men hetta er bert hálvur sannleikin. Talan er um tvey ógvuslig brot á byggisamtyktina.

Tá talan er um tvíhús krevur byggisamtyktin 400 m² til hvønn partin av einum tvíhúsum, ella 800 m² íalt. Kommunan kann geva frávik niður til 300 m² fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, men her hevur kommunan givið loyvi til 250 m² fyri hvønn partin av einum tvíhúsum. Her er talan um 100 m² uttan fyri nakra lógarheimild!!!

Innlendismálaráðið sigur millum annað í síni grundgeving at:

*»Grundgevingin fyri hesum er, at byggistigið við ítøkiliga frávikinum veksur munandi og verður umleið ein triðing størri enn ásett er í byggisamtyktini - ábyggingarstigið sambært byggiloyvinum svarar til 198 m², hóast § 5, stk. 4 ásetur, at byggistigið í mesta lagi kann verða 0,3 (sum svarar til 150m²)«* (her er talan um eitt brot á byggisamtyktina uppá 48 m²).

*»Aftrat hesum kemur, at tvíhús verða bygd á einum grundstykki, sum samanlagt er 500 m², hóast byggisamtyktin í hvussu so er krevur 300 m² fyri hvønn partin av einum tvíhúsum, ella samanlagt 600 m².«* (her er talan um eitt brot á byggisamtyktina uppá 100 m²)

**Frávik og óreglusemi, í byggimálum, hava verið siðvenja hjá Klaksvíkar kommunu.**

Hetta viðgongur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri eisini, tá hann sigur »at tað er mikið sannlíkt, at fleiri mistøk eru hend (les: gjørd) frammanundan hesum ávísa málinum«.

Hesin óskikkur eigur at steðga beinanvegin og Innlendismálaráðið ger eisini púra greitt í sínum grundgevingum, at frávik helst ikki skulu gevast og bert í serligum førum, sí niðanfyristandandi brot úr teirra grundgevingum:

**»Alment um fráviksreglurnar í byggisamtyktini**

*Fráviksreglan í § 9 er í tveimum - ein heimild er til kommununa at geva smávegis lættar, og ein heimild er til landsstýrismannin at gera frávik.*

*Í mun til heimildina at geva lættar sambært § 9, stk. 1 skal viðmerkjast, at Innlendismálaráðið er av teirri fatan, at henda heimild eftir sínum orðaljóði (ásetingin um, at byggivaldið kann geva lættar, tá tað snýr seg um mál av litlum týdningi), og í samsvari við vanligar fyrisitingarligar reglur um undantøk, má tulkast trongt. (mín undirstriking) Henda fatan verður stuðlað av, at ásetingin má samanhaldast við ásetingina í § 9, stk. 2, sum er ein meira almenn og víð heimild hjá landsstýrinum at gera frávik frá ásetingunum í byggisamtyktini. Innlendismálaráðið er tí av teirri fatan, at heimildin í § 9, stk. 1 t.d. í ongum føri kann røkka til at geva lættar (ella frávik), sum fara so langt, at eyðkenni ella karakterurin av økinum, sum byggisamtyktin miðar móti at skapa og varðveita, broytist.*

*Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at Innlendismálaráðið alment er av teirri fatan, at frávik frá eini byggisamrykt einans eigur at verða gjort í undantaksføri um avgerandi fyrilit tala fyri hesum, (mín undirstriking) og tá bara um frávikið ikki er so víðgongt, at tað ber brá av broyting í byggisamtyktini. Atlitið til fastognarfólki á staðnum - ið má kunna hava álit á byggisamtyktini, sum er gjørd eftir neyvari umhugsan og við sakkønari hjálp - hevur tí eisini stóran týdning í hesum sambandi.*

*Avleiðingarnar av einum fráviki kunnu eisini gerast víðfevndar, tí aðrir borgarar kunnu ikki setast øðrvísi enn umsøkjarin, um teir eru í somu ella líknandi støðu. Hetta talar tí eisini fyri at vera varin, tá um frávik ræður."( mín undirstriking)*

Sostatt er staðfest, at frávík / undantøk bert skulu verða givin hendingaferð og bert tá tað er átrokandi neyðugt og gagnligt, ikki minst til fastognarfólk á staðnum. Innlendismálaráðið ger eisini vart við og minnir á at: *"Atlitið til fastognarfólki á staðnum - ið má kunna hava álit á byggisamtyktini,* **sum** *er gjørd eftir neyvari umhugsan og við sakkønari hjálp (min undirstriking) - hevur tí eisini stóran týdning í hesum sambandi."*





FØROYAPRENT
www.foroyaprent.fo · Tel. 314 555 · Fax 318 026

WWW.SMYRIL-LINE.COM




DANMARK

1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
DANLAND Í BLOKHUS & HIRTSHALS
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 7.950,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland-íbúð í 1 viku.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
DANCENTER-SUMMARHÚS
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 7.780,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi.

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
SKALLERUP KLIT FERIECENTER
13/8, 20/8, 27/8 & 3/9 úr 9.400,-
**Íroknað er:** Sigling Tórshavn-Hanstholm og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku á Skallerup Klit Feriecenter.

super AUGUST TILBOÐ

NOREG

1 VIKA Á PERS HOTEL
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
Í SMÁTTU Í GOL Í NOREGI
9/8, 16/8, 23/8 & 30/8 úr 6.890,-
**Íroknað kostnaðin:** Sigling Tórshavn-Bergen og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Hartil 7 gistingar í smáttu, uttan kost.

Á FERÐUNUM fara heimskendir pianoentertainarar, sum Stefan Ujvari (NO) og Göran Berndsson (SE) at borðreiða við fjølbroyttum tónleiki umborð.

HETLAND

1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN + BIL
2-RÚMS ÍBÚÐ Í EASTERHOULL CHALETS
9/8, 16/8, 23/8 & 30/8 úr 6.980,-
**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í 1 viku í summarhúsi.

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

SMYRIL LINE